# FSF um Tórsvøll

Vit eiga hús í Gundadali. Soleiðis tók Torleif Sigurðsson til, tá nevndin í FSF og umboð fyri limafeløgini vóru saman á árliga fundinum í november.

Á aðalfundinum leygardagin staðfesti Torleif Sigurðsson, at FSF higartil ikki í fult mát hevur nýtt heimildina at seta pengar í Tórsvøll, sum aðalfundurin áður hevur givið nevndini.

– Føroysku feløgini hava givið okkum heimild at seta 2,5 milliónir í ætlanina. Vit hava brúkt 1,5 milliónir. Burtursæð frá tí hava vit lænt grunninum fýra milliónir at byggja hús fyri.

Grunnurin hevur rindað fyri bygningin, men nú er tað ikki FSF, men grunnurin Tórsvøllur, ið framvegis stendur sum ánari. FSF formaðurin staðfesti eisini, at tá tað í fíggjarætlanini fyri byggingina stóð, at húsini fóru at kosta 9,0 milliónir, so var hetta alt ov lágt sett. Formaðurin roknaði við, at tá húsini eru klár til nýtslu, so fara tey at kosta í minsta lagið 13,0 milliónir krónur.

Tá eru høli til umklæðing, brúsur, vask, dómararúm og annað, sum hoyrir til í sambandi við dystirnar, og høli til pressuna uppi í. Formaðurin helt ikki, at tað var sjálvsagt, at Fótbóltssambandið rindaði henda partin. Upplagdi parturin av húsunum, sum FSF skuldi brúka, vóru tær báðar miðhæddirnar, sum FSF ætlar at brúka til umsitingina, skeiðvirksemi, fundir og annað.

**Samráðingarnar**

Christian Andreasen, advokatur, kom í heyst upp í Tórsvallar málið sum umboð fyri FSF. Hann gav á aðalfundinum eina frágreiðing um gongdina síðani tá:

Viðurskiftini vóru ógreið, men eftir samráðingar millum grunnin og FSF var síðst í november semja um, at FSF skuldi rinda 4,0 milliónir krónur fyri tað, sum higartil er gjørt í húsunum, og at húsini skuldu vera ogn hjá FSF á leigaðum øki.

27. desember varð endalig avtala undirskrivað. Av tekniskum ávum, sum hava við studningsheimildina úr landskassanum at gera, eigur grunnurin Tórsvøllur nú húsini, men tað er ein partur av avtaluni, at Fótbóltssambandið kann – um teir vilja tað – yvirtaka húsini, tá ella um ynski verður um tað.

FSF fær afturgoldið 1,2 milliónir av láninum av studningurin frá tí almenna til Tórsvallar ætlanina, sum verður rindaður í 2001, og restupphæddin, sum er 2,8 milliónir krónur, er eitt skuldarbræv, sum verður avskrivað yvir 20 ár.

JH

# Torleif setti sessin upp á spæl

*Ársaðalfundur:* *FSF formaðurin fekk feløgini við sær, men tað var ikki fyrrenn tey greitt høvdu givið til kennar, at tey eru ikki nøgd við leiklutin hjá Fótbóltssambandinum í Tórsvølli*




*Torleif Sigurðsson skelkaði luttakararnar á aðalfundinum, tá hann boðaði frá, at hann ikki tók við aftur afturvalið*

***Mynd: Jens K. Vang***

Torleif Sigurðsson er framvegis formaður í Fótbóltssambandinum. Men eina løtu á ársaðalfundinum í Norðurlandahúsinum leygardagin setti formaðurin síðani 1981 sessin upp á spæl.

Formaðurin undirstrikaði, at hann á ongan hátt ynskti at hótta limafeløgini, men hóast hesa útsøgnina snúði Tórsvallar málið, sum varð viðgjørt í meiri enn tveir tímar, seg í síðsta enda um eina álitisváttan ella misálitisváttan á Torleif Sigurðsson sum formann í FSF.

At enda fekk formaðurin sín vilja í spurninginum um Tórsvøll, men undir viðgerðini og í sambandi við báðar atkvøðugreiðslurnar, sum vóru um málið, góvu limafeløgini týðuliga til kennar, at tey eru í villareiði ella misnøgd við leiklutin hjá FSF í málinum um landsstadion í høvuðsstaðnum.

Á fleiri av fundarluttakarunum skiltist, at orsøkin til at Torleif Sigurðsson fekk sín vilja var, at feløgini í nógv flestu lutum hava verið stak væl nøgd við formannin tey síðstu knøppu tjúgu árini.

Um formaðurin hevði lagt frá sær, so hevði tað eisini í altjóða høpi verið ein stórur missur fyri føroyskan fótbólt, tí Torleif Sigurðsson hevur verið við til at vunnið føroyskum fótbólti virðing uttanfyri landoddarnar.

**Feldu uppskotið**

Turbulensurin á aðalfundinum stóðst av, at nevndin í FSF vildi hava feløgini at geva nevndini heimild til at inniloka og fíggja bygningin, ið stendur sum eitt byggipláss á vestursíðuni á Tórsvølli.

– Hetta er alneyðugt. Stálkonstruktiónirnar eru ikki rustfríar, og um veggir, tak, vindeygu og hurðar ikki verða gjørd nú beinanvegin, so minkar virðið í tí, sum er gjørt.

Hetta var boðskapurin hjá formanninum. Feløgini vildu hava at vita, hvat arbeiðið kostaði. Torleif Sigurðsson upplýsti, at teir hava eitt tilboð um at gera arbeiðið fyri 1,8 milliónir krónur.

Eftir orðaskifti aftur og fram, har uppskot um at sleppa øllum húsamálinum til Tórshavnar býráð og um at útseta málið til ein seinni fund vóru frammi, gjørdi fundarstjórin, Jógvan Arge, av fyrst at seta uppskotið hjá nevndini í FSF til atkvøðugreiðslu.

Níggju atkvøður vóru fyri. Uppskotið var harvið útsett, staðfesti fundarstjórin, og tá næsta punkt á dagsskránni var val av formanni, boðaði Torleif Sigurðsson frá, at hann hevði tikið avleiðingarnar av atkvøðugreiðsluni.

– Eg taki ikki við afturvali sum formaður. Tað eri eg, sum vegna FSF havi havt við Tórsvøll at gera, og tá feløgini ikki taka undir við tí, sum eg í støðuni, sum vit nú eru í, haldi vera skilabest, so dugi eg ikki at síggja endamálið í, at Torleif Sigurðsson heldur fram sum formaður í Fótbóltssambandinum.

**Stutt tjóður**

At nýggjur formaður skuldi veljast uttan at hetta á nakran hátt tóktist vera fyrireikað, kom so óvart á, at fundurin varð niðurlagdur eina løtu.

Tá fundurin varð tikin uppaftur hevði nevndin skoytt upp í sítt uppskot um heimild, at kostnaðurin fyri húsaarbeiðið skuldi ikki fara uppum 1,8 milliónir krónur. Um nevndin ætlar sær at brúka meiri pengar upp á at innrætta húsini, so skal hon frammanundan at nakað verður gjørt koma til ein ársaðalfund og møguliga ein eykaalfund fyri at fáa heimild fyri hesum.

Í fyrstu atløgu bað fundarstjórin fundin um heimild til so at siga at spola aftur í fundinum og taka Tórsvallarmálið aftur til viðgerðar. Tað fekk hann.

– Eg síggi ikki mun á uppskotunum. Uppískoytið tykist heldur vera ein ábending um, at feløgini ikki hava álit á, at nevndin fer at arbeiða fyri, at innilokingin verður so bílig, sum tað ber til. Nú er orðingin soleiðis, at um 1,8 milliónir eru brúktar, og ein skorsteinur er eftir at seta upp, so er ikki heimild fyri hesum.

Hesi orðini átti Heri Mortensen, formaður í TB, sum var ein av fleiri, ið hildu støðuna vera ógreiða og óhepna.

Tá tað varð atkvøtt av nýggjum vóru fjúrtan atkvøður fyri broytta uppskotinum hjá nevndini í FSF – ella vóru tað fjúrtan, sum atkvøddu fyri, tí tey vildu ikki hava, at Torleif Sigurðsson segði formanssessin frá sær.

JH




*Eftir at hava fundast nakað aftur og fram, varð formaðurin kortini afturvaldur, men samstundis fingu feløgini høvi til at føra síni sjónarmið fram*

***Mynd: Jens K. Vang***

# Feløgini um Tórsvøll

Á ársaðalfundinum hjá føroyska fótbóltinum leygardagin var Tórsvøllur tað málið, sum fekk nógv drúgvastu umrøðuna. Umboð fyri umleið helmingin av feløgunum, sum vóru umboðað (øll feløgini uttan NÍF og SÍ vóru á fundi), tóku lut í kjakinum.

Reyði tráðurin í orðaskiftinum var, at luttakararnir vóru ørkymlaðir, og tað kendist eitt sindur undarligt, at grunnurin fekk nógv høgg oman yvir seg, meðan næstformaðurin í grunninum, Torleif Sigurðsson, umboðaði FSF, og fyrrverandi nevndarlimurin, Heðin Mortensen, í hvussu so er ikki umboðaði grunnin.

**Sjónarmiðið hjá advokatinum**

Einasti maður, sum av fullum huga tosaði fyri nevndina í grunninum, var advokaturin hjá grunninum, Jógvan Páll Lassen. Hann fanst hvassliga at illgrunanum, sum onkrir av fundarluttakarunum meiri enn róðu fram undir, um at HB skuldi sita á grunninum:

– Tórshavnar býráð eigur grunnin, og hann er púra óheftur av øllum feløgum. Tað er meiri enn kann sigast um stadion inni á Toftum, har FSF hevur bundið seg so tætt at einum av limafeløgunum, at tað kann hava óhepnar avleiðingar við sær, segði Jógvan Páll Lassen, sum undirstrikaði, at ætlanin gongur sína gongd:

– Nú er ein avtala fingin í lag við Fótbóltssambandið, og nú fer grunnurin undir at fáa tað arbeiðið frá hondini, sum enn restar í á hinum partinum av Tórsvølli. Fíggjarliga eru tingini í lagi. Einasti ivaspurningurin er, um ein rennibreyt skal gerast ella ikki. Um rennibreytin skal gerast, so dýrkar tað um samlaðu ætlanina, men hetta letur seg væl gera tekniskt. Grunnurin skal bara fáa at vita, hvat myndugleikarnir ætla sær at gera.

**Sjónarmiðini hjá feløgunum**

At limafeløgini í FSF vóru ørkymlað, kom m.a. til sjóndar, tá Petry Joensen úr Sumba spurdi, um tær fýra milliónirnar frá FSF vóru eitt lán, sum skuldi endurrindast ella ein gáva.

Svend Jacobsen, formaður í KÍ, segði seg ivast so nógv í ætlanini, at hann mælti í fyrsta umfarið til, at setur verða gjørd kring vøllin á Svangaskarði. Harvið helt hann, at trygd fór at verða fyri, at tað eisini í summar fór at bera til at spæla altjóða fótbólt í Føroyum.

Kristian á Neystabø fanst hvassliga at mátanum, sum ætlanin er handfarin uppá. Hann helt bæði kostnaðarætlan og tíðarætlan vera uttan hald í veruleikanum.

Hesum gav Heðin Mortensen, sum hevði rætt at taka orðið, tí hann er formaður í ÍSF, honum rætt í. Heðin Mortensen er fyrrverandi nevndarlimur í Tórsvølli. Hann segði ikki, hvat grundarlag hann hevði fyri sínari meting, men mótsatt advokatinum hjá grunninum, so helt hann, at tað restaðu í minsta lagi tíggju og kanska tjúgu milliónir í, um møguleiki skal verða fyri at gera ætlanina lidna.

Frits Witt umboðaði MB, og hann mælti til, at FSF slapp sær burturúr Tórsvølli:

– Um grunnurin og harvið Tórshavnar býráð gera arbeiðið liðugt, so kann føroyski fótbólturin seinni taka støðu til, um hann yvirhøvur ynskir at leiga ella eiga hølini. Tað ber til at fáa høli til keyps ella leigu alla staðni fyri prísin á Tórsvallarhúsunum.

Sjónarmiðið um at grunnurin átti at verið avtikin, og at Tórshavnar býráð sjálvt tók ábyrgdina á seg, varð tikið upp av Heðini Mortensen, sum boðaði frá, at málið um Tórsvøll skjótt fer at koma á borðið aftur hjá býráðnum. Hann roknaði við, at partamaðurin hjá honum, Kaj Leo Johannesen, sum er formaður í mentunarnevndini hjá býráðnum, fór at vera ein teirra, sum fer at vera positivt sinnaður fyri at fáa spurningin avgreiddan.

Kaj Leo Johannesen, sum var á aðalfundinum, tí hann er formaður í Havnar Fótbóltur, helt, at stóri spurningurin er, um vit vilja hava eitt landsstadion og hvar vit vilja hava tað at vera. Tá tann spurningurin er avgreiddur mugu má kósin rættast eftir at røkka málinum.

JH

